# Bjarni Djurholm slær undir beltið

**Bæði fyrrverandi nevndaformaðurin í Framtaksgrunninum og stjórin á Føroya Fiskavirking siga tað vera ókent fyri teimum, at nevndin fyri Framtaksgrunnin skal hava skotið upp at selja leiðsluni í Fiskavirking høvuðspartin av felagnum. Landsstýrismaðurin slær undir beltið, sigur stjórin á Fiskavirking. Bjarni Djurholm stendur við síni orð**

VINNUMÁL
*Edvard Joensen*



*– Tað eru sera góð viðurskifti millum starvsfólk og leiðslu á Føroya Fiskavirking. Vit hava í felag skapt eitt stabilt og trygt arbeiðspláss, og tað er ófatiligt, at slíkir pástandir yvirhøvur skulu verða havdir á munni, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking*

– Tað er nýtt fyri mær, at vit skulu hava skotið hatta upp, sum Bjarni Djurholm sigur við Sosialin týsdagin, sigur Vilhelm Petersen, fyrrverandi nevndarformaður fyri Framtaksgrunnin.

Heldur ikki Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, kennir nakað til eitt slíkt uppskot. Hann sigur, at hann metir hesi orðini hjá landsstýrismanninum sum eina roynd at seta kílar millum stravsfólkið og leiðsluna á Føroya Fiskavirking. Eitt slag undir beltið, sigur hann.

Bjarni Djurholm heldur fast við, at soleiðis varð tað orðað. Hann stendur við tað, hann er endurgivini fyri í Sosialinum.

Vilhelm Petersen vísir tó ikki aftur, at tað á onkrum fundi kann hava veirð nevnt yvir borðið, at Føroya Fiskavirking átti at verðið selt starvsfólkinum. Men hatta ítøkiliga uppskotið, landsstýrismaðurin sigur nevndina hava havt, avvísir hann blankt at kenna til.

– Vit hava hinvegin heilt greitt gjørt klárt, at vit ynsktu at selja Føroya Fiskavirking á einum virðisbrævamarknaði. So kundu starvsfólkini eisini tann vegin sloppið upp í part, sigur Vilhelm Petersen.

Hetta váttar Bjarni Djurholm, landsstýrismaður. Hann vísir tó á, at hann sjálvur ásannaði, at ein virðisbrævamarknaður var rætta loysnin, men at hesin lá so mikið langt úti í tíðini, sum útlitini vóru til, at hann helt hina loysnina, at selja arbeiðsfólkinum Fiskavirking javnt, vera betri.

### Breiðan eigaraskara

Vilhelm Petersen sigur, at fyrrverandi nevndin fyri Framtaksgrunnin viðgjørdi hetta málið gjølla, og at nógvir møguleikar vórðu nevndir.

Endamálið við viðgerðini var greitt at fáa eins so breiðan eigarskara sum gjørligt, at yvirtaka Føroya Fiskavirking frá Framtaksgrunninum. Tí tað stendur jú í viðtøkunum, at seljast skal.

Vit løgdu eina ætlan og komu til, at virðisbrævamarknaðurin var tað, sum vit hildu vera bestu loysnina, og tað hava vit eisini nevnt fyri landsstýrismanninum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sigur við Sosialin, at á einum fundi, hann hevði við nevndina fyri Framtaksgrunnin, var viðgjørt, hvussu fáast kundi ein breiður eigaraskari til Fiskavirking.

– Tá varð júst nevnt sum punkt eitt at selja partabrøv til ein leiðlsubólk í Føroya Fiskavirking, sigur Bjarni Djurholm.

Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking, sigur, at hann kennir einki petti til at hava fingið boðið nakað tílíkt, sum Bjarni Djurholm nevnir, hóast leiðslan í Fiskavirking vanliga verður kunnað um tær viðgerðir, sum eru av fyritøkuni.

– Tað eru sera góð viðurskifti millum starvsfólk og leiðslu á Føroya Fiskavirking. Vit hava í felag skapt eitt stabilt og trygt arbeiðspláss, og tað er ófatiligt, at slíkir pástandir yvirhøvur skulu verða havdir á munni, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking.

Hinvegin sigur hann, at tað er vanligt aðrastaðni, at fyritøkur verða seldar teimum, sum starvast hjá feløgunum.

Tað kann hava sínar orsøkir, vísir Meinhard Jacobsen á. Eitt nú at virði kunnu roknast í øðrum enn reiðum peningi.

Tað fólk og tann vitan, sum er í eini fyritøku, hevur ofta størsta viðið, tá farast skal víðari, vísir hann á.

### Andaði í nakkan

Vilhelm Petersen, fyrrverandi nevndarformaður fyri Framtaksgrunnin, heldur fast við, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, legði seg út í arbeiðið hjá Framtaksgrunninum.

– Vit kendu tað soleiðis, at hann vildi hava ávirkan á, hvat gjørt varð, og tað kundu vit ikki góðtaka. Hóast hann sigur, at tað ikki var so, vísir skrivið, sum nú er almannakunngjørt, greitt, at hann legði seg út í arbeiði okkara, sigur Vilhelm Petersen.

Hann vísir til, at hóast tað í brævinum frá landsstýrismanninum bert er eitt lítið brot, har landsstýrismaðuri beinleiðis sigur seg vera ósamdan við nevndina, er tað tó ein heilt greið ábending á, hvat farið er fram á nógvu fundunum partanna millum.

### Brævið ongan týdning

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, heldur hinvegin upp á sítt. Hann hevur ongantíð lagt seg út í arbeiðið hjá nevndini fyri Framtaksgrunnin, sigur hann. Hann hevur sagt sína hugsan, og tað metir hann seg hava fullan rætt til.

Hann sigur, at fyrrverandi nevndin fyri Framtaksgrunnin og landsstýrismaðurin hava havt nógvar góðar fundir sínámillum eftir, at umrødda bræv varð skrivað, til nevndin fór frá í mars mánaða.

– Grundin til, at nevndin valdi at leggja frá, sær, sigur Bjarni Djurholm, var ein persónsspurningur. Tá eg hevði boðað frá, hvønn eg ætlaði at velja nýggjan í nevndina, varð boðað frá, at tað vildu summir av verandi nevndarlimum ikki. Teir valdu at siga sessin frá sær. Hóast heitt varð á teir fleiri ferðir um at halda fram, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum.

– Eg havi altíð hildið, og geri tað enn, at nevndin varð mannað við fult kvalifiseraðum fólki, sigur Bjarni Djurholm. Og eg harmist um, at teir løgdu frá sær.

## Kundu forgjørt sær á Vestmannasundi

**Ókunnleiki og nógv ferð kundu endað við eini rættiligari vanlukku á Vestmannasundi sunnudagin. Ein skjóttgangandi glastrevjabátur við ferðafólki kom í trupulleikar á Sundinum**

FLUTNINGUR
*Edvard Joensen*

Ein av mongu bátunum, sum flutti fólk um Vestmannasund sunnudagin, mundi komið rættiliga illa fyri við fleiri ferðafólkum umborð.

Talan var um ein glastrevjabát, sum við 12 flogferðafólkum og tveimum, sum hoyrdu til bátin, við nógvari ferð var um at koppa, siga vitni, sum sóu tilburðin.

Onkusvegna fekk báturin ikki gronina leysa úr sjónum og legði seg rættiliga nógv. Hann sigldi einar tvær ferðir í ring, áðrenn hann var rættaður ordiliga uppaftur, sigur ein, sum sá tilburðin.

Menn, sum kenna hesar bátarnar, siga, at tað var bara ein grund til hendingina, og tað var kleyvarskapur.

14 vaksin fólk umframt alt viðførið, flogferðafólkið hevði við sær, var alt á dekkinum. Tá verður tyngdarpunktið flutt so øgiligt, at tað kann skjótt enda galið.

Hesaferð gekk tað væl, men fólkini fingu ein rættiliga skelk, skilst á teimum, sum sóu tilburðin.

# Truplari at skipa landingarnar undir verkfallinum

**– Tað er meira hóvasták av summum sølum í dag, enn tá ið umstøðurnar eru vanligar, sigur Pauli Højgaard, góðskuleiðari á Fiskamarknaði Føroya á Toftum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*– Enn hevur gingið hampiliga væl at skipað søluviðurskiftini undir verkfallinum, men ilt er at siga, hvussu verður, um verkfallið verður drúgt, sigur Pauli Højgaard, góðskuleiðari á Fiskamarknaði Føroya*

Higartil hevur verkfallið hjá Føroya Skipara-og Navigatørfelag ikki havt so stóra ávirkan á virksemið hjá Fiskamarknaði Føroya.

Pauli Højgaard, góðskuleiðari, viðgongur tó, at tað er truplari at skipa landingarnar, nú verkfall er, og serliga merkist hetta í samskiftinum millum uppboðssøluna á Toftum og uppboðssøluna í Klaksvík, tí fjørður er ímillum og ikki ber til at flyta fisk ímillum hesi bæði økini.

– Klaksvíkin er meira avbyrgd, nú eingin fiskaflutningur er um fjørðin. Tað eru skip, sum vanliga landa í Klaksvík, men sum nú stundum mugu aðrastaðni við fiskinum, tí aðrir keyparar eru. Heldur ikki fæst fiskur, sum verður seldur á gólvinum í Klaksvík, av oynni.

Góðskuleiðarin vísir á, at tað er meira hóvasták av summum sølum í dag, enn tá ið umstøðurnar eru vanligar, og viðhvørt er neyðug aftaná eina sølu at finna út av, hvussu viðurskiftini skulu greiðast, tí onkur keypari ikki fekk tann fisk, hann hevði keypt.

– Somuleiðis kann henda, at okkurt virki hevur keypt eina last, men fær ikki brúkt øll fiskasløgini.

Pauli Højgaard sigur, at enn hevur gingið hampiligt at skipað viðurskifti, men ilt er at siga, hvussu verður, um verkfallið verður drúgt.

Týsdagin landaðu fýra skip á Fiskamarknaði Føroya; Váðasteinur, Volunteer, Kúrberg og trolbáturin, Hansa Maria.

– Hesin fiskurin er keyptur av virkjum í nærumhvørvinum, nú ikki ber til at flyta fiskin millum firðirnar, sigur góðskuleiðarin.

Møguliga landar Tummas Nygaard eisini á Toftum í vikuni.

### Skiljimaskinan

Fyrst í hesum árinum varð ein nýggj og framkomin skiljimaskina sett upp á Fiskamarknaði Føroya á Toftum. Frammanundan varð gamla útgerðin, sum uppboðssølan hevur brúkt, flutt suður á uppboðssøluna í Vági.

Drúgv tíð gekk, áðrenn tey á uppboðssøluni sóu nakra veruliga nyttu í nýggju maskinuni, tí nógv ting skuldu fáast at hanga saman. Samstundis kom nógvur fiskur uppá land, og hetta gjørdi tað trupult hjá uppboðssøluni í vár.

– Í dag riggar sjálv skiljimaskinan væl, og hon er nær við at verða tað, vit væntaðu av henni. Neyðugt hevur verið við tilvenjing og tilpassing av øllum, sum er rundan um maskinuna. Í dag vildi neyvan nakar verið nýggju skiljimaskinuna fyriuttan, sigur Pauli Højgaard.

# Uppgangandi prísir á toski

**Í Klaksvík lata útróðrarmenn illa at prísunum, sum teir siga eru nógv lækkaðir, síðan verkfallið byrjaði. – Sum heild, hevur verkfallið ikki ávirkað fiskaprísirnar niðureftir, sigur góðskuleiðarin á Fiskamarknaði Føroya á Toftum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*- Prísurin á toski hevur í seinastuni verið nakrar krónur hægri fyri kg., enn tá ið hann var lægstur, sigur góðskuleiðarin á Fiskamarknaði Føroya á Toftum.*

Seinastu dagarnar hava søgur gingið um, at verkfallið hevur elvt til lækkandi fiskaprísir.

Sosialurin hevði eitt dømi um blaðnum í síðstu viku. Talan var um djúpvatnstrolaran, Suðring, sum var á veg inn við eini last av kongafiski og upsa. Fiskavirking á Tvøroyri plagar at keypa veiðina hjá eitt nú Suðringi, men við tað, at virkið ikki fekk sent fesk, ísað fløk av landinum, tí eingin flutningur er norður um Suðuroyarfjørð, noyddist virkið at keypa fiskin til frystingar, og tá fekk Suðringur 3-4 krónur minni fyri kongafiskin. Tað helt reiðaríið ikki vera nøktandi prís og valdi í staðin at fara niður til Cuxhaven at selja.

Tað er ivaleyst torført at taka saman um og siga, at soleiðis og soleiðis eru prísirnir, nú verkfall er, tí ymiskt er, hvar og hvussu verkfallið rakar.

Í Klaksvík lata útróðrarmenn illa at prísunum, sum teir siga eru nógv lækkaðir, síðan verkfallið byrjaði.

Hugsast kann, at færri keyparar eru til fiskin hjá útróðrarmonnum í Klaksvík, nú fiskur ikki fæst av oynni, og lítið man vera at ivast í, at tað gongur útyvir prísirnar.

### Uppgangandi

Pauli Højgaard, ið starvast sum góðskuleiðari á Fiskamarknaði Føroya á Toftum, heldur ikki, at prísirnir á gólvinum á Toftum eru lægri, enn teir hava verið. Tað er heldur soleiðis, at prísirnir í seinastuni hava verið uppgangandi. Tað, sum selt verður á gólvinum, er oftast útróðrarfiskur.

Mánadagin fóru toskur 1 og toskur 2 fyri út við 20 krónur fyri kg., toskur 3 fyri stívliga 10, toskur 4 fyri góðar 9 og toskur 5 fór fyri 8 krónur fyri kg.

– Hetta er rímiliga góður prísur, sum er nakrar krónur hægri, enn tá ið hann var lægstur.

Pauli Højgaard sigur, at fiskaprísirnir sum heild hava verið uppgangandi í seinastuni.

– So, eg haldi ikki, vit kunnu siga, at verkfallið higartil hevur ávirkað prísirnar niðureftir, sigur góðskuleiðarin.

## Jaspis og Ametyst landað í Saltangará

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Partrolararnir, Jaspis og Ametyst, landaðu í Saltangará týsdagin. Jaspis, sum hevði stívliga 900 kassar, landaði beinleiðis til Fiskavirking í Saltangará, meðan Ametyst, sum hevði einar 800 kassar, landaði til P/F Beta. Meginparturin av veiðini hjá báðum skipunum var upsi. Bert eitt sløð var av øðrum fiski, einir 23 kassar tilsamans.

Fiskavirking í Saltangará keypir upsan hjá báðum trolarunum.

### Upsaprísurin

Jason Johannesen, virkisleiðari, sigur, at prísurin á upsa er støðugur. Hann er ikki ávirkaður av verkfallinum, sum er.

– Vit keypa ikki meira fisk hesa vikuna, tí vikan er so stutt. Arbeitt verður til á middegi hósdagin, tá ið fólkið fær frí.

Hann sigur, at fyri at fáa fiskin undir land, eru tey farin til arbeiðis klokkan 07 alla hesa vikuna og arbeitt verður eitt sindur longri enn vanligt.

– Neyðugt er, at gólvini eru turr, tá ið farið verður heim hósdagin á middegi, tí vikuskiftið er so langt, sigur Jason Johannesen.

HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Xantia
1,9 TD 5H
km. 94.000, árg. okt. 1996
115.000,-

Citroen Xantia II
2,0 HDi stc. 5H
km. 120.000, árg. sept.1999
139.000,-

Citroen Xsara
2,0 HDi Week.
km. 29.500, árg. juni 2000
150.000,-

Citroen ZX 1,4i
5H
km. 105.000, árg. aug. 1995
70.000,-

Mitsubishi L300
2,5D
km. 161.000, árg. juni 1994
70.000,-

Mitsubishi Lancer
5h GLXi
km. 124.000, árg. juni 1992
50.000,-

Fiat Tipo
5h
km. 109.000, árg. mai 1989
sýnaður 12'01 26.000,-

Hyundai Accent 1,3
LS 5H
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Peugeot 306
D 4H
km. 150.000, árg. apr. 1995
80.000,-

Ford Courier vøruv.
1,8D
km. 78.000, árg. feb. 1996
47.000,-

Ford Escort 1,6i STC.
VA
km. 95.500, árg. mars 1997
53.000,-

VW Polo
1,9TD
km. 120.000, árg. mai 1996
75.000,-

Citroen Xsara
1,9TD
km. 83.000, árg. des. 1998
120.000,-

Nissan
Sunny
km. 197.000, árg. 1987
sýnaður 01'02 11.000,-

Mazda 323
1,3 4h
km. 211.000, árg. 1989
32.000,-

Møguleiki er eisini at royna nýggjar bilar

Vælkomin til
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820